


www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 12 - 2011

# Russiskur oljupallur sokkin

Ein oljupallur við 67 fólkum er sokkin nærhendis russisku oynni Sakhalin har norðuri í Kyrrahavinum. Tíðindastovurnar skriva, at 14 fólk eru bjargað á lívi, men at tey eru sera illa fyri eftir at hava ligið í tí sera kalda sjónum. Sagt verður, at myndugleikarnir vænta ikki at finna fleiri á lívi. Ein talsmaður fyri russisku myndugleikarnar sigur við tíðindastovuna AFP, at teir vóru í ferð við at sleipa pallin, sum æt Kolskaya, tá illveður brast á. Sjógvur kom í pallin, men meðan manningin bíðaði eftir bjargingartyrlum, holvdist pallurin og sakk. Tað hendi so knappliga, at menninir fingu ikki stundir at fara í bjargingarbátarnar. Bjargingarskip hava seinni funnið fýra bjargingarbátar, men teir vóru tómir. Russisku myndugleikarnir kanna nú, um teir, sum áttu pallin, hava hildið galdandi trygdarreglur.